

# HEIMSGITIN FLOGSKIPARI HVÍLDI SEG Á TVØROYRI

**TANN** 23. AUGUST Í **1933** SETTI EITT LÍTIÐ **FLOGFAR** SEG Á **TRONGISVÁGSFJØRÐ**. VIÐ **FLOGFARINUM** VÓRU **HEIMSGITNI** FLOGSKIPARIN, **CHARLES LINDBERGH**, OG KONA HANSARA, **ANNE MORROW**. TEY VÓRU Í **ARBEIÐSØRINDUM** FYRI PAN AMERICAN AIRWAYS Á VEG TIL **KEYPMANNAHAVNAR**. CHARLES LINDBERGH VAR TÁ EIN **SONN HEIMSSTJØRNA**, TÍ HANN SUM TANN FYRSTI **NAKRANTÍÐ** HEVÐI **FLOGIÐ** EINSAMALLUR TVØRTUR UM **ATLANTSHAVIÐ** Í 1927. EISINI HØVDU **LINDBERGH** OG KONAN ÁRIÐ UNDAN **VITJANINI** Á TVØROYRI **MIST** EIN SON, IÐ VARÐ **BURTURFLUTTUR** OG DRIPIN



**FLÚGVING**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Flúgving í Føroyum var alt annað enn vanlig í 1933, og tá ein lítil flúgvari sást yvir Trongisvágsfirði mikudagin 23. august hetta árið, vóru øll í bygdini ovurspent, bæði tí so sjáldsamt var at síggja flogfør, og tí maðurin umborð hevði verið heimsgitin í fleiri ár. Fólk høvdu frætt, at Charles Lindbergh skuldi koma til Tvøroyrar týsdagin 22. august, og tey høvdu bíðað eitt langt og sjey breið, men onki flogfar kom. Spurningurin var, um Lindbergh mundi vera farin til Hetlands og kortini ikki fór at millumlenda í Føroyum, men seinnapartin mikudagin kom fjarrit úr Reykjavík um, at Lindbergh hevði sett kós ímóti Føroyum.

Tvøráfólk høvdu ikki meira enn lisið fjarritið, so hoyrdist dun av flogfari, og Charles Lindbergh kom flúgvandi inn eftir fjørðinum. Mikil rokan var av fólki, og tey flestu runnu oman á bryggjuna at forvitnast. Flogfarið setti seg mitt fyri bygdini og varð bundið í eina boyu. Tá báturin við Charles Lindbergh og konuni legði at landi, tók formaðurin í sóknarstýrinum, Herluf Thomsen, ímóti teimum og bað mannamúgvuna rópa eitt trífalt hurrá fyri gestunum. Haðani varð farið niðan til stjóran í A/S Niels Juel Mortensen, Gudmund Mortensen. Ein langur riðil av børnum fylgdi gestunum.

> *Longu í 1919 hevði ein hotelleigari í New York, Raymond Orteig, kunngjørt, at tann flogskiparin, sum fyrstur megnaði at flúgva einsamallur úr USA til Evropa uttan steðg, skuldi fáa 25.000 dollarar fyri bragdið. Fleiri høvdu roynt, og summir vóru deyðir*

Hetta var vorðið sum gestur at fáa í Føroyum í eini tíð, tá flúgving var so óvanlig. Blaðmenn høvdu sum vera man stóran áhuga fyri ferðini, og ein teirra var Jørgen-Frantz Jacobsen, ið var í Føroyum fyri Politiken. Hann hitti dagin eftir Charles Lindbergh, men flogskiparin var fáorðaður. Segði onki um ta farleið millum USA og Evropa, sum hann kannaði fyri Pan American Airways, men var fryntligur. Danskarar høvdu stóran áhuga fyri hesi farleið, so lesararnir hjá Politiken høvdu ivaleyst viljað frætt meiri frá Jørgen-Frantz Jacobsen, enn teir gjørdu, men tá Lindbergh onki vildi siga, varð tað so.

### Fleyg í 33 tímar

Charles Lindbergh varð føddur 4. februar í 1902 í Detroit í USA. Hann vísti tíðliga, at hann hevði sera góð evnir at fáast við alt, sum var tøkniligt, og serliga stóran áhuga hevði hann fyri flúgving. Í 1920 fór hann at lesa verkfrøði, men honum dámdi betur at eygleiða gongdina í tí spírandi flogídnaðinum, og tvey ár seinni fór hann úr skúlanum, so hann kundi gerast flogskipari, ið framdi kynstur við flúgvisýningar. Í 1924 fór hann í amerikanska herin at fáa venjing sum flogskipari, og í 1925 stóð hann royndina sum tann besti næmingurin.

Longu í 1919 hevði ein hotelleigari í New York, Raymond Orteig, kunngjørt, at tann flogskiparin, sum fyrstur megnaði at flúgva einsamallur úr USA til Evropa uttan steðg, skuldi fáa 25.000 dollarar fyri bragdið. Fleiri høvdu roynt, og summir vóru deyðir, so sera vandamikið var at royna. Í 1927 hevði framvegis ongin framt bragdið, men Charles Lindbergh helt, at hann var førur fyri at flúgva einsamallur til Evropa. Hann bað ein handilsmann um fígging at byggja eitt heilt nýtt flogfar til ferðina. Flogfarið varð bygt í San Diego og varð nevnt Spirit of St. Louis.

Charles Lindbergh royndarfleyg 10.

**KELDUR:** FØROYAR Í FLOGSØGUNI, WWW.CHARLESLINDBERGH.COM, WIKIPEDIA